# r um lív ella deyð



- Summir politikkarar gera gjøldur burtur úr ætlanini um ein undirsjóvartunnil okkum. Teir siga, at hetta bara fer at gera tað lættari hjá sandoyingum at sleppa til hugnakvøld í Havn. Slíkt tos er púra burturvið, sigur Eyðun Viderø

Mynd: Jens Kr. Vang

*Orðatakið sigur, at tað sum fyrst er komið í drag, er ofta verri at fáa í lag. Og hvør veit, kanska verður alt bara dýrari um vit bíða ov leingi*

*(Eyðun Viderø, fyrrverandi tingmaður)*

*Eg veit bara tað, at búskapurin er so ikki vorðin ovurhitaður her hjá ogon*

*(Eyðun Viderø, fyrrverandi tingmaður)*



- Tann ovurhitaði búskapurin er ikki skaptur her á Sandoynni, sigur Eyðun Viderø

Mynd: Jens Kr. Vang

sum so: - Hví skal eg hava stríð av at búgva her við virksemi mínum, tá ein verður so nógv forðaður av ferðasambandinum?! Tá er nógv lættari at sláa seg niður í Havn.

- Teistin kann ikki nøkta tørvin hjá einum vinnulívi í oynni, um tað verður útbygt nakað. Tí er støðan hon, at tann sum ynskir at skapa eitt vinnulív her, hevur ikki tíð og pening at bíða eftir Teistanum. Umsetningurin er kortini so avmarkaður, at tey loysir seg nógvar ferðir betri at seta virkið upp í meginøkinum.

Vinnuligt virksemi er ofta treytað av einum virkisfúsum persóni, og kemur tunnilin og er orka í fólk, kann so nógv gott spyrjast burtur úr.

Tá hetta er sagt, so hevur Eyðun als ikki mist vónina um eina bjarta framtíð fyri heimaoyggj sína. Hann vísir til útstykkingarnar á Sandi og í Skopun, tí sum hann sigur:

- Ein veit jú aldrin, hvørji fólk fara at flyta higar í framtíðini.

## Kann ikki divid- era eina íløgu

Sum fyrrverandi landspolitikkari veit Eyðun alt um hvussu fíggjarviðurskiftini hjá landinum eru, hvat ein ovurhitaður búskapur er, og hvat tað hevði kravt av peningi at bora Sandoyartunnilin, eisini um ein roknar útreiðslurnar fyri hvønn íbúgvan sær.

Ein slík íløga kostar helst einar 700 milliónir. Tí skilir Eyðun væl, at fólk siga at hetta er alt ov mikið og at íløgan ikki loysir seg fíggjarliga. Men hann vil tó siga, at ein kann ikki í øllum førum dividera við fólkatalinum, fyri at fáa at vita, um ein íløga ber seg. Skal ein kanska flyta øll fólkini av Fugloynni, tí henda rutan hjá Strandferðsluni ikki ber seg fíggjarliga? Ella skulu vit gera allar íløgur í og rundan um Tórshavn, tí har er kostnaðurin minstur fyri hvønn íbúgva?

Og vit mugu ikki gloyma, at her er ikki einans talan um krónur og oyru, men um mannalagnur!

- Eg skilji væl, at fólk pástanda at hetta eru ov nógvir pengar til so fáment øki, men hinvegin kann ein ikki dividera upp í eina íløgu. Tað gevur so onga meining. Men eg vil kortini siga, at við at binda Sandoynna saman við restini av landinum, so verða Føroyar í fyrsta lagi størri.

- Harnæst fara fólk at koma aftur higar at búgva, og fer hetta at lætta munandi um trýstið og trokingina í Havnini, sigur Eyðun.

Hann undrar seg eisini yvir, hví ein ikki fór í gongd við Sandoyartunnilin longu fyri fleiri árum síðani, tá búskapurin var munandi kaldari enn hann er nú og maskinurnar til tunnilsgerðina kortini vóru í landinum!

Á Sandoynni er bíligari at búseta seg, og við føstum sambandi hevði fjarstøðan til meginøkið ongan týdning havt. Fólk høvdu tá vilja komið aftur higar at búgva, og hevði tað aftur skapt fyritakssemi og liviumstøður í oynni.

- Jú, eg haldi, at Sandoyggin er so mikið stór og hevur so nógvar møguleikar í sær, at tað er grundarlag fyri eini íløgu at binda hana saman við meginøkið, slær Eyðun fast.